Viðmerkingar til:

Uppskot til broyting av Løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

Mínar viðmerkingar hava serliga fokus á høvusspurningin nr. 3. Hvussu skal námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skipast?

- **§ 5a** Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar.

Viðmerking:

Tað er gleðiligt at allar kommunur skulu veita námsfrøðiliga ráðgeving, og tað hevur stóran týdning at stovnarnir kunnu fáa hesa tænastu veitta.

- **§ 5a** Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum at tryggja trivnað og menning hjá børnum.

Viðmerking:

Námsfrøðiliga vegleiðingin skal fevna um inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum at tryggja trivnað og menning hjá børnum.

Og víðari stendur undir **1.3 Endamálið við uppskotinum (s.7)**, Kommunurnar hava í høvuðsheitum námsfrøðingar sum hægstu útbúgving....

At ráðgeva í inklusjón, og seta í verk fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at tryggja trivnað og menning hjá børnum, hugsi eg krevur eina størri vitan, enn námsfrøðingurin á dagstovnaøkinum hevur ogna sær. Tí um námsfrøðiligi ráðgevin og námsfrøðingurin á dagstovnaøkinum hava somu útbúgving, hava hesi fakfólk somu vitan innan inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum skulu setast í verk við tí endamálið, at stuðla starvsfólkum at tryggja trivnað og menning hjá børnum.

Mín fatan er at námsfrøiligi ráðgevin, skal hava størri fakliga vitan, also aðrar útbúgvingar, møguliga hægri útbúgvingar og arbeiðsroyndir. Fyri at ráðgeva fakfólki á dagstovnaøkinum krevst ein størri vitan enn ein námsfrøðilig útbúgving einsamøll gevur kunnleika til. Til dømis í undirvísingar høpi, so skal ein lærari í undirvísir til dømis í námsfrøði á bachelor støði, hava eina hægri akademiska útbúgving.

Mín fatan er ikki, at tað skal vera kræv, tá tú byrjar í starvi sum námsfrøðiligur ráðgevi, at námsfrøðingurin skal hava vitanina áðrenn hann verður settur í starv, men at tá tú ert settur í starvi, verður tað kravt, at tú fert undir útbúgving, fyri at skapa møguleika fyri at ogna tær størri og hægri vita, enn námsfrøðingurin á dagstovnaøkinum.

- **§5** Stk. 2 Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.

Viðmerking:

Um námsfrøðiliga ráðgevingin skal hava somu útbúgving, sum námsfrøðingarnir á Dagstovnaøkinum, hví skal námsfrøðiligi ráðgevin heita á sernámsfrøðiligu ráðgevingina? Eru námsfrøðingarnir á dagstovna økinum, sum er saman við barninum á stovninum, og tí hava møguleika fyri at hava størri vitan og kunnleika um barnið, ikki førðir fyri at meta um, nær tørvur er á, at heita á sernámsfrøðina hjá landinum? Er hetta ikki at undirmeta vitanina hjá námsfrøðingunum á dagstovnaøkinum?

Hugsanin at námsfrøðiliga ráðgevingin hevur roynt ella sett ymisk tiltøk í verk í mun til barnið, áðrenn heitt verður á sernámsfrøðinga, hugsi eg er góð, men hetta krevur fleiri námsfrøðiligar ráðgevar settir í starv, also størri fíggjarliga orku, hjá nøkrum av kommununum.

Maria Johannesen

Námsfrøðiligur ráðgevir í 16 ár